# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**5. sunnudag e. páskir**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Sonja Klein
***Kaldbak***: kl. 12 Bjarni Bæk, altargangur
***Sørvágur:*** kl. 11 David Johannesen
***Kvívík:*** kl. 12, altargongd (skriftarmál kl.11.50) Marjun Bæk
***Eiði:*** kl. 11 messa Emil Olsen
***Fuglafjørður:*** kl. 11, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen
***Sandvík:*** kl. 12 Jónsvein Bech.

**KFUK og KFUM**
Eldrasamkoman og Varðmenn í KFUM fara útferð til Húsavíkar, kristihimmalsferðardag 17. mai. Tilmelding á tlf. 311928 ella 211824, seinast mánadagin 14. mai.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni.
K. 18 Møti við Jústines Poulsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 17.00 bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli. Leygardagin einki Flare vegna legu!
Sunnudagin kl. 10.45 Møti, kl. 11.30 sunnudagsskúlin.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15,00 Bøn.
Hósdag kl. 20 Heimaforbund fyri allar kvinnur.
Sunnudag kl. 11 Møti.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Bøn kl. 17.30.
Møti kl. 18.
sápa, suppa og frelsa síðan 1865.
Øll eru vælkomin!

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Mikudagin kl. 7 bøn.
Hósdagin kl. 7 bøn, kl. 20 ungdómsmøti v/Fólki frá bíbliuskúlanum »Veien« í Bergen.
Fríggjadagin kl 07.00 bøn, sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta v/ Símun Absalonsen evni: Handlandi trúgv kl 14.00 sunnudagsskúli, mánakvøldið kl 17.15- 18.00 venur barnakórið kl 19.30 Fyrilestur v/ Steen Palmqvist evni: Tannáringar í familjuni. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Leygardagin kl. 13 brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 evangeliskt, Gordon Greeve talar á báðum møtunum.
http://www.gospel.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, 1. Tim. kap. 2, 1-7.
Hóskvøldið kl. 20 Møti v. Trev Gregory.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v. Trev Gregory.
Leygardagin kl. 10-15 Skeið v. Trev Gregory, tilmelding við SMS til 262598.
Leygarkvøldið kl. 20 Bønarkonsert v. Trev Gregory.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Trev Gregory, tulka verður til føroyskt. Bjartur syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Týsdag kl. 18.55
Sangvenjing, Gospel Hearts, kl. 20.00 Sangvenjing, Ebenezerkórið
Mikudag kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - Talari: Søren Joensen
Hósdag kl 17.00 Sangvenjing, Kassia
kl. 20.00 Ungdómsmøti - Talari: Einar Vang
Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans.
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Lívdin**
**Í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti.
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 tilbiðjunarmøti har Jógvan Z. talar um Rómbrævið 8.28
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúlin.
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma,**
**Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Aglow-Vágar**
Møti verður í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági 12 mai kl 20. Gordon Grieve úr Kanada kemur at tala. Møti er bæði fyri kvinnur og menn. Verið hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 17.30 bøn fyri hvítusunnustevnuni.
Leygardagin kl. 17.30 bøn fyri hvítusunnustevnuni.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Linda Petersen talar um breyðbróting.

**Kedron í Sørvági**
Mikudagin 9.5.2007 kl. 20. Onki Bønarmøti vegna tað at húsbólkarnir samlast heima hjá teimum ymisku.
Sunnudagin 13.5.2007. Breyðbróting við Læru kl: 11. Evangeliskt møti kl. 18.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Børnini Møtast:**
Børnini møtast kl. 11 í kjallaranum í KEDRON, har øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 16.5.2007.
Bønarmøtið kl. 20.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Týsdagin 8/5 Seniorløta í Saron kl. 15-17.
Mikudagin 9/5 Bønarmøti í Saron kl. 20.
Hósdagin 10/5 sortera vit klæðir til Rumenia kl. 19.
Sunnudagin 13/5 evangeliskt møti við John og Marion Drury, sum eru seniorpastorar í Blue Mountains City Church í Avstralia. kl. 18.
Nátturði aftaná.

**AGLOW Eysturoy**
Kvøld fyri ungar gentur og kvinnur verður í Kelduni fríggjakvøldið 11. maj kl. 20.
Talari: Mariann Jacobsen
Evni: Sjálvsvirði
Umboð frá felagskapinum KRIS verða við.
Lovsangur við Kristinu Hansen o.fl.
Drekkamuður verður at fáa, og kafiteria er opið.
Kostnaður fyri kvøldið 50 kr.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldi kl. 21, Awake við Eyð, Ingibjørn o.fl.
Sunnudagin kl. 17 Familjumøti, nátturði aftaná (øll taka við).
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikudagin kl.18.00 Tim5. Kl. 20 Ungdómsmøti og kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 16 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 9. mai kl. 20 bíbiltími.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30.
Hjørleif Vang talar. Evni: Tryggleikin í Kristusi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kfum og Kfuk Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Pól Johannesen.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið Hús.
Sunnukvøldið kl. 14 Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00 Pól Johannesen, evnið: Týdningurin av at hava eitt andaligt Heimamissiónin.
Kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Getsemane,**
**á Brekku 19 Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 er bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við André Matras.
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14 er møti, sunnudagsskúli er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl. 6:15 er morgunbøn.

**Frá Soli Deo Gloria Klaksvík**
Týskvøldið 8. mai kl. 20 møti við Susanne og Leif Madsen trúboðarar í Kenya.
Mikukvøldið kl. 20 hugnaløta fyri ung.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Hallgerð og Hendrik.
Sunnukvøldið kl. 18 verður familjumøti við Hallgerð og Hendrik. Náttverði verður aftaná møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Tú er hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini!

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími, Hebr. 13. kap.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdag kl. 20 Bønarløta.
»Kom við og bið!«
Leygardag kl. 19 Árasøla! Øll eru hjartaliga vælkomin!
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
www.frelsunarherurin.fo

**Betania, Sumba**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kristiligir fundir í Danmark**
Fríggjakvøldið 13. mai kl. 19.30 kristiligur fundur í Mølleparken, Spangbergs Møllevej 16 í Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19 kristiligur fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17 kristiligur fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Emsi Restorff og Hans Jákup á Lava syngja.
Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 7. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobb o.o. spøl.
***Túrur til Tjørnuvíkar mikudagin 23. mai. Úr Steinatúni kl. 13. Frásøgufólk og drekkamunnur í bygdarhúsinum. Kostnaður 100,-***
***Tilmeld. tlf. 316491***
***Týsdagin 8. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***kl. 15-17 Hjartafelagið skipar fyri heilsudagi í Tilhaldinum. Heilsa - Heðin Thomsen, hjartalækni***
***Heilsugóður kostur - Ulla Brandi, kostráðgevi. Møguleiki er at fáa tikið blóðtrýst, blóðsukur og kolesterol (kostnaður 20,-) Somuleiðis verður frukt at fáa. Keypsamtøka.***
***Mikudagin 9. mai***
kl. 10-12 Tóvirkið (veving, maskinbinding, seyming, binding o.a.) Ása, Katrin, Margit, Marita og Marita.
***Vit fyrireika okkum til Mentanarnáttina 1. juni.***
kl. 14-17 Eftirmeting av telduprátinum
kl. 15 ***«Likamsrørsla er av alstórum týdningi fyri at betra um fólkaheilsuna« (AHR). Njóti hetta saman við okkum. Vit ganga. Møti stundisliga. Við bussi út á Marknagilsvegin - ganga oman í Sandágerð. Randi/Elisabeth, fysioterapeutar***
***Hósdagin 10. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-12 Máling og Tekning
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 11. mai***
kl. 10-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Dagtilhaldið í Gøtubrá, Gøtu tlf. 441662**
Opið týsdag kl. 15-18.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18.00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Skrá vika 19***
***Mánadagur 7. mai.***
Fimleikur. Felagssangur.
***Týsdagur 8. mai.***
Hugnaløta v. Heina F. Petersen og Theodor Hansen.
***Mikudagur 9. mai.***
Opið hús.
***Hósdagur 10.mai.***
Opið hús.
***Fríggjadagur 11. mai.***
Boccia.
***Vit minna á, at leygardagin 19. mai er Eldradagurin 2007 í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun. Allir pensionistar eru vælkomnir. Kostnaður. Vit ætla okkum at fara. Hevur tú hug at koma við? Tú kanst eisini tekna teg í Fløvanum.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks, somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mikudagin 9. mai***
Fimleikur við Jacquline Benzon.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum.**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá kl.15-18.
***Týsdagin 8.5.07.***
Hugna vit okkum, vit spæla og binda.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.